gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Mugu geva tol í eina viku afturat

**Hóast semja nú er gjørd um sandoyarferjuna, Teistan, fer tað at taka eina viku, áðrenn hann verður settur í sigling, sigur stjórin á Strandferðsluni**

SANDOYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

Hóast semja nú er gjørd um lønina hjá yvirmonnunum á Teistanum, mugu sandoyingar brynja seg við toli í eina tíð afturat.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at hóast øll viðurskifti nú eru greið, fer tað at taka eina viku, ella átta dagar, at gera Teistan kláran at fara í sgiling.

Men tað eru ikki viðurskifti, sum Strandferðslan hevur ávirkan á, sum gera, at Teistin ikki kann fara í sigling beinanvegin.

– Beinanvegin, semjan var ð gjørd, góvu vit boð boð um at fara undir arbeiðið at fyrireika Teistan til at fara í sigling.

Men áðrenn hann kann setast í rutu, er tað neyðugt at manningin hevur bjargingarroyndir umborð, umframt at annað arbeiðið eisini skal gerast.

– Hetta eru krøv, sum Skipasýnið setir, skulu gerast, áðrenn Teistin fer í sigling og tað tekur einar sjey, átta dagar at fáa alt tað frá hondini.

Sostatt fer tað ikki at eydnast at fáa Teistan í sigling til Sandoyarstevnuna, sum verður nú um vikuskiftið.

## Stóran týdning

Annars fegnast strandferðslustjórin stórliga um, at tað loksins eydnaðist at fáa semju um Teistan.

– Støðan var ótolandi so tað er gleðiligt, at semja nú er fingin, sigur hann.

Og hóast tað er synd at siga, at tað gekk eftir vild við Teistanum, er tað tó í hvussu so er ein tíðarætlan hjá Strandferðsluni, sum helt.

Og tað er at fáa Teistan í sigling í góðari tíð mitt í summar, áðrenn vetur kemur.

Júst tað er Reidar Nónfjall ógvuliga fegin um, tí hann sigur, at tað hevur avbera stóran týdning.

– Skipið er nýtt og hevur nógva, nýggja, tekniska útgerð. Hóast manningin hevur havt eitt sindur av venjing, hevur tað sera stóran týdning, at manningin fær dygga venjing í at sigla skipið, nú ímeðan veðrið er gott.

Hann sigur, at farleiðin ímillum Gomlu Rætt og Skopun er skrásett sum opið hav.

– Tá ið tað rekur harðast, rekur eini 11 míl í Hestfirði. Er so harafturat stormur, alda og myrkt, hevur tað stóran týdning, at manningin er fullkomiliga trygg við skipið.

– Og nú semja er fingin um Teistan, ber tað til hjá manningini at fáa tað neyðugu venjingina í at sigla skipið, ímeðan veðrið enn er gott. Og tað hevur stóran týdning fyri trygdina, sigur stjórin á Strandferðsluni.



*Hóast semja nú er um Teistan, ber tað ikki til at seta nýggju sandoyarferjuna í sigling, fyrrenn um eina viku, sigur stjórin á Strandferðsluni*

# Hava tvær semjur um Teistan at velja ímillum

**Tað tók tríggjar mánaðir at fáa semju um nýggju Sandoyarferjuna, Teistan. Men nú tað loksins loysnaði, hava skiparin og stýrimenninir fingið ikki minni enn tvær semjur at velja ímillum**

SANDOYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Eftir at hava samráðst í 37 tímar, eydnaðist tað loksins at semjast um lønina hjá yvirmonnunum á Teistanum. Men ikki bara tað. Nú hava yvirmenninir heilar tvær semjur at verlja og vraka ímillum. Semjan førir til, at Sandoyarferjan nú sleppur í sigling, men ikki fyrrenn um eina viku*

Tað loysti seg at fara til Sands.

Tað mugu bæði Karsten Hansen, landsstýrismaður og Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum, nú ásanna.

Eftir at hava samráðst um lønina hjá yvirmonnum á Teistanum í tríggjar mánaðir, gjørdi borgarstjórin á Sandi, Páll á Reynatúgvu, eina óvanliga roynd fyri at fáa sandoyarferjuna í sigling: Hann beyð teimum pørtunum í ósemjuni at koma til Sands at samráðast.

Og tað loysti seg, tí sandoyarferðin endaði við, at semja varð gjørd um Teistan so at nýggja sandoyarferjan loksins sleppur í sigling.

Men tað var drúgvt.

Samráðingarnar á Sandi byrjaðu týskvøldið, men tað var ikki fyrrenn kl. 8.30 hósmorgunin, at semja fekst um Teistan.

Tá høvdu teir samráðst í 37 tímar út í eitt, bara avbrotnir av onkrari máltið og onkrum gongutúri fyri at klárað høvdið.

Men tá ið partarnir so loksins vórðu samdir, skrivaðu teir ikki bara undir eina semju.

Samráðingarnar um Teistan endaðu nevniliga við, at yvirmenninir á Teistanum nú hava fingið heilar tvær semjur at velja ímillum.

Sostatt kunnu teir velja ímillum um teir vilja hava eina vanligan sáttmála, ella teir vilja hava fasta løn.

Báðar semjurnar eru undirskrivaðar og tað stendur nú til yvirmenninar sjálvar at velja aðra og at skræða hina sundur og koyra hana í pappírskurvuna.

Eftir aðrari semjuni verður Teistin settur í bólk 2, og skiparin verður løntur í lønarflokki 8, yvirstýrimaðurin í bólki 6 og fyrsti stýrmaður í bólki 5.

Eftir hesari semjuni fáa teir vanlig ískoyti fyri eykasigling o.s.fr.

Eftir hinari semjuni, eru yvirmenninir fastløntir, tvs, at teir fáa eina fasta løn, sama, hvussu nógv teir sigla.

Yvirmenninir skulu nú hava fund um, hvørja lønarskipan, teir vilja hava.

Høvuðstrupulleikin við Teistanum var, at sjóferðslumyndugleikarnir krevja, at tveir stýrimenn skulu vera við og ósemjan varð um, hvussu teir so skulu bólkast, tí á Dúgvuni og Ternuni er bara ein stýrimaður.

## Eitt megnar arbeiði

Bæði Ellintur Abrahamsen og Karsten Hansen eru samdir um, at tað var eitt gott tiltak av borgarstjóranum á Sandi, at bjóða samráðingarpørtunum til Sands at samráðast.

– Eisini gjørdi hann eitt megnar arbeiði undir samráðingunum og hann eigur ein stóran part av heiðrinum fyri, at semja kom í lag, siga Ellintur Abrahamsen og Karsten Hansen.

# Karsten er nøgdur, men Ellintur ivast

**– Karsten Hansen er væl nøgdur við at tað eydnaðiast at fáa semju um sandoyarferjuna Teistan. Formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum er meiri ivingarsamur**

SANDOYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

– Eg eri sera væl nøgdur við, at tað eydnaðiast at fáa semj um Teistan.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, ásannar, at teistamálið hevur riðið teimum sum eina marru nú í tríggjar mánaðir og tí var tað ein ómetaligur lætti at fáa semju nú.

– Trupulleikin var, at Skiparað og Navigatørfelagið vildi ikki hava semingsmenn upp í samráðingarnar. Men nú fingu vit seo hendan nýggja vinkulin upp í samráðingarnar og tað loysti málið.

Karsten Hansen gevur nevniliga hugskotinum hjá Páll á Reynatúgvu at bjóða teimum suður til Sands at samráðast, allan heiðurin fyri,at semja fekst í lag nú.

– Hann hevur verið eitt slag av semingsmanni og tað gørdi hann við stórum hegni.

Hann sigur, at tvær semjur eru gjørdar, ein semja um vanligan sáttmála og ein fastlønarsáttmála.

Vit kunnu liva við báðum semjunum.

Hann sigur, at í samráðingunum hesuferð, hava báðir partar givið seg.

## Ivingarsamur

Hinvegin er Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum, meiri ivingarsamur.

–Vit fingu ikki tað, vit høvdu ætlað. Eg haldi, at tað er ótrúligt, at tað skuldi taka so langa tíð, at koma til hetta úrslitið, sigur Ellintur Abrahamsen.

Hann sigur, at ferlagið er so ivingarsamt um úrslitið, at tað eisini hevur fingið ein fastlønarsáttmála.

–Hesin fastlønarsáttmálin er ikki so góður, sum vit kundu hugsað okkum, men yvirmenninir á Teistanum sleppa nú at taka støðu til, hvønn sáttmála, teir vilja hava, sigur Elllintur Abrahamsen.

Nær støða verður tikin til tað, veit hann ikki.

– Vit fingu ikki tað, vit vildu hava, men vit valdu kortini at geva okkum fyri at fáa semju, sigur Allintur Abrahamsen. Felagið kravdi, at skiparin varð løntur í flokki 9, yvirstýrimaðurin í bólki 8 og 1. stýrimaður í bólki 6. Úrslitið varð, at skiparin kom í bólk 8, yvirstýrimaðurin í bólk 6 og 1. stýrimaður í bólk 5.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Politistar bakka út úr yvirtøkuætlan

**Føroya Politistafelag er ikki longur við í fyrireikingunum hjá landsstýrinum til at yvirtaka løgregluna. Felagið heldur ov nógvan politikk vera komnan í málið. Høgni Hoydal skilir ikki støðuna og hevur biðið um frágreiðing**

YVIRTØKA
*John Johannessen*

Samstarvið millum Høgna Hoydal, landsstýrismann, og Føroya Politistafelag at fyrireika eina føroyska løgreglu er slitnað.

Sosialurin veit frá keldum innan løgregluna, at felagið heldur ov nógvan politikk vera komnan í málið, og vil tí ikki longur vera við í arbeiðinum. Politistafelagið heldur, at Høgni Hoydal og danski forsætisráðharrin eiga at finna út av, um løgreglan skal yvirtakast ella ikki, áðrenn arbeiðið heldur fram.

Per Person er formaður í Politistafelagnum. Sosialurin hevur roynt at fáa viðmerking frá honum, men hann er ikki at hitta. Hinir limirnir vilja ikki gera viðmerkingar til málið.

## Vil hava frágreiðing

Høgni Hoydal er harmur um, at Politistafelagið brádliga hevur tikið seg burtur úr arbeiðinum.

– Vit hava fingið bræv frá danska fakfelagnum, COII, um at Politistafelagið hevur tikið seg burtur úr. Eg skilji ikki støðuna og havi biðið um eina frágreiðing, tí vit hava nýtt sera nógva orku uppá at fáa løgregluna við og hava tosað við allar partar í málinum, sigur Høgni Hoydal.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at talan var um ein sera góðan fund, tá hann fyrstu ferð var á fundi í nevnini, og tí undrar tað hann, at hendan støðan brádliga hevur tikið seg upp.

Hóast Politistafelagið hevur tikið seg burtur úr, ætlar Høgni Hoydal ikki, at arbeiðið við at fyrireika eina føroyska løgreglu skal steðga upp.

– Vit mugu bara arbeiða víðari, men plássini standa altíð opin fyri løgregluumboðunum, sigur Høgni Hoydal.



*Løgreglan skal gerast føroysk í hesum valskeiðinum. Men Politistafelagið, sum hevur verið við til at fyrireika føroysku løgregluna, meldar nú pass, tí ov nógvur politikkur er í málinum. Her handtaka føroyskir løgreglumenn í donsku løgregluni í Føroyum um middagsleitið í gjár russiskan skipara, sum danska sjóverjan hevur tikið fyri at fiska ólógliga í føroyskum sjóøki*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Yvirtakast í valskeiðinum

Nevndin, sum nú bert er hálvmannað, hevði sín fyrsta veruliga fund í Tinganesi 14. juni, men kortini hevur leingi verið arbeitt við fyrireikingunum til føroyska løgreglu.

Arbeiðssetningurin hjá nevndini er at gera tilmæli um, hvørjar broytingar eiga at verða framdar, soleiðis, at ein føroysk løgregla kann loysa allar tær uppgávur, sum liggja á løgreglum í framkomnum london. Og hetta arbeiðið skal gerast skjótt, tí ætlanin er at yvirtaka løgregluna í hesum valskeiðinum.

# Brúkarastovnur á veg

**Áhugamál føroyska brúkarans skulu tryggjast. Hetta heldur Javnaðarflokkurin, sum tíðliga í komandi tingsetu fer at leggja uppskot fyri tingið um nýggjan brúkarastovn. Flokkurin sigur seg hava tikið avleiðingarnar av, at føroyski brúkarin stendur ógvuliga veikur**

BRÚKARASTOVNUR
*John Johannessen*



*Javnaðarflokkurin fer tíðliga í komandi tingsetu at leggja fyri tingið lógaruppskot um ein ítøkiligan brúkarastovn, ið skal tryggja áhugamál føroyska brúkarans. Hans Pauli Støm hevur saman við øðrum fyrireikað eitt álit, sum løgfrøðingur nú arbeiðir víðari við*

Javnaðarflokkurin vil hava settan á stovn ein brúkarastovn, sum kann tryggja áhugamálini hjá føroyska brúkaranum.

Tí setti flokkurin fyri tíð síðani ein arbeiðsbólk at tilevna eitt álit, sum nú er komið so mikið langt, at tað verður latið serkønum løgfrøðingum at orða til lógaruppskot.

Hans Pauli Strøm, sum er ein av stigtakarunum til uppskotið, sigur, at tað leingi hevur verið greitt, at føroyski brúkarin stendur ógvuliga veikur. Og eru trupulleikar, stendur hann bæði ráðaleysur og verjuleysur. Tí hevur Javnaðarflokkurin tikið avleiðingarnar og er farin at fyrireika ein brúkarastovn.

## Einsamallur brúkari

– Føroyski borgarin hevur ongastaðni at fara at fáa hjálp í gerandisligu støðu síni sum brúkari, tá hann heldur seg vera fyri órætti, tá hann hevur hug at kæra og tá orð stendur móti orði millum brúkara og seljara, vísir Hans Pauli Strøm á.

Tingmaður Javnaðarfloksins ásannar, at tað sjálvsagt altíð ber til at fara í rættin. Men hetta heldur hann vera alt ov kostnaðarmikið, drúgt og trupult fyri einstaka borgaran.

– Tað er ikki hugsingur um hjá tí einstaka brúkaranum at fara rættarvegin í slíkum máli. Tí er brúk fyri einum brúkaraumboðsstovni, sum brúkarin kann venda sær beinleiðis til, og sum kann taka sær av hansara áhugamálum, sigur Hans Pauli Strøm.

## Øðrvísi stovnur

Men Hans Pauli Strøm ætlar ikki, at føroyski brúkarastovnurin skal vera samlíkur teimum í grannalondunum.

– Í hinum norðurlondunum eru brúkaraáhugamál vard av nógvum ymiskum stovnum. Tey hava til dømis Brúkaraumboðsmannin, Brúkarakunningarstovnin, Brúkarastýrið, Brúkarakærunevndir, Brúkararáðið og onnur.

– Alt hetta verður ov rúgvusmikið og fløkjasligt hjá okkum. Tí skjóta vit upp, bert at skipa ein einfaldan og liðiligan stovn, sum hóskar til okkara fámenta samfelag og kann røkja flest møguligar av teimum uppgávum, sum í øðrum londum eru spjaddar út á fleiri ymiskar stovnar. Vit skulu hava ein stovn, sum byrjar í smáum, og síðani kann vaksa við uppgávunum, so hvørt tørvurin og undirtøkan økist, sigur Hans Pauli Strøm.

Javnaðarflokkurin legði í gjár álit sítt fyri sakførara, sum fer at gera lógaruppskotið um brúkarastovnin klárt at leggja fyri tingið tíðliga í komandi tingsetu.

## Hetta skal brúkarastovnurin gera:

- At upplýsa, ráðgeva og verja brúkaran móti órætti í brúkaraviðurskiftum.
- Brúkarastovnurin skal hava førleika og myndugleika at viðgera øll brúkaramál, tilmæla í trætum, royna semju ella kunna fara rættarvegin.
- Brúkarastovnurin skal skipa fyri dygdargóðari brúkaraupplýsing, gera prís- og dygdarkanningar, veita góð brúkararáð og virka fyri gjøgnumskygni í samband við marknaðarføring og prísáseting.
- Brúkarastovnurin skal virkar fyri góðum samstarvi við vinnuna, so tað kann fremja góð viðurskifti millum brúkarar og seljarar.


